## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi, seinnapartin frískar hann vindin av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul millum eystan og sunnan og regn av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landsynningi, sunnudagin upp í hvassan vind. Lítið ella einki avfall og hitin millum 5 og 9 stig.

# Jens Marni ætlar sær til Oslo



*Jens Marni Hansen hitaði upp á Skarv – føroyska vertshúsinum í Keypmannahavn leygarkvøldið*

**- Men tað er eingin skandala, um eg ikki vinni – hetta er kortini ein máti hjá mær at blíva kendur í Danmark, sigur Jens Marni Hansen**

**TÓNLEIKUR**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í hesum døgum er Jens Marni Hansen staddur í Danmark, har hann fyrireikar seg til stóru Grand Prix finaluna, sum verður leygarkvøldið. Hann skal syngja ein sang, sum forsangarin í Johnny DeLuxe, Noam Haldby, hevur skrivað saman við øðrum.

Leygarkvølidð hitaði hann upp við framførslu á føroyska vertshúsini Skarv í Keypmannahavn, har stappað var við fólki.

Jens Marni Hansen sigur við Sosialin, athansara sangur eitt lag, sum hann roknar við verður eitt hitt, men upp á fyrispurningin um, hvørt hann strýkur avstað við fyrsta plássinum, torir hann einki at siga um, tí hann hevur ikki hoyrt hinar sangirnar.

- Men eitt er heilt vist. Eg fari at gera mítt til fyri at vinna, mín innsatsur skal so ikki liggja eftir. Um eg ikki vinni, so er tað eingin skandala, tí hetta er ein partur av framtíðar promoveringini av mær í Danmark – hetta er fyrsta stigið á leiðini. So vónandi kemur hendan framførslan at gera, at eg ofta í framtíðini verði at síggja á donskum tónleikapallum í framtíðini, sigur Jens Marni Hansen.

Danska Grand Prix kappingin hjá Danmarks Radio verður í Ålborg leygarkvøldið, har 10 solistar og bólkar skulu royna at vinna kappingina og danska plássið í altjóða kappingini, sum verður í Oslo. Danmarks Radio sendir sjálvandi kappingina úr Ålborg beinleiðis í sjónvarpi leygarkvøldið.

562 buðu seg fram at vera við í kappingini, har 10 drógu longstu stráini at verða við í Ålborg leygarkvøldið.

Sangurin, sum Jens Marni Hansen fer at syngja, eitur Gloria, og er ein popputur rocksangur.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | |
| Aberdeen | 4 |
| London | 5 |
| Tromsø | -3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -5 |
| Stokkhólm | -3 |
| Keypmannah. | -3 |
| Helsinki | -10 |
| Moskva | -15 |
| Berlin | -11 |
| Warzawa | -13 |
| Kiev | -16 |
| Bukarest | -13 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 6 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 32 |

### LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 994 hPa. við Vestur-Noreg fer suðureftir.

**Komandi nátt:**
Hátrýstryggurin vestan fyri Føroyar fer eystureftir og viknar. Brúgvalagið frá Suður-Grønlandi til ìrland stendur mestsum í stað.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/01 kl. 06[00] – 25/01 06[00]. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í januar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í januar: +13,7°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 24/01 kl. 06[00] – 25/01 06[00].
Avfallið higartil í januar: 121 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

30. januar – Mánin næstur jørðini/ Fullmáni
5. februar – Seinna kvarter
13. februar – Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. feb | 08:58 | 21:21 | 07:58 | 20:21 | 08:13 | 20:36 | 10:58 | 23:21 | 11:58 | - |
| 3. feb | 09:45 | 22:09 | 08:45 | 21:09 | 09:00 | 21:24 | 11:45 | - | 00:21 | 12:45 |
| 4. feb | 10:34 | 23:12 | 09:34 | 22:12 | 09:49 | 22:27 | 00:09 | 12:34 | 01:09 | 13:34 |
| 5. feb | 11:50 | - | 10:50 | 23:15 | 11:05 | 23:30 | 01:12 | 13:50 | 02:12 | 14:50 |
| 6. feb | 00:15 | 13:08 | - | 12:08 | - | 12:23 | 02:15 | 15:08 | 03:15 | 16:08 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. feb | 07:13 | 19:36 | 06:13 | 18:36 | 09:13 | 21:36 | 10:13 | 22:36 | 08:43 | 21:06 | 09:58 | 22:21 |
| 3. feb | 08:00 | 20:24 | 07:00 | 19:24 | 10:00 | 22:24 | 11:00 | 23:24 | 09:30 | 21:54 | 10:45 | 23:09 |
| 4. feb | 08:49 | 21:27 | 07:49 | 20:27 | 10:49 | 23:27 | 11:49 | - | 10:19 | 22:57 | 11:34 | - |
| 5. feb | 10:05 | 22:30 | 09:05 | 21:30 | - | 12:05 | 00:27 | 13:05 | 11:35 | - | 00:12 | 12:50 |
| 6. feb | 11:23 | 23:48 | 10:23 | 22:48 | 00:30 | 13:23 | 01:30 | 14:23 | 00:00 | 12:53 | 01:15 | 14:08 |